VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn, seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið leygardagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið lot av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Stívt andøvsgul upp í ein strúk av eystri og sólglottar, men møguliga ælingur týsdagin. Hitin millum 12 og 16 stig.

Barnabók um ommu, sum hevur Alzheimer

Á altjóða alzheimerdegnum, sum er í dag 21. september, gevur Bókadeild Føroya Lærarafelags út barnbókina Heystið hjá ommu eftir Dagmar H. Mueller og Verena Ballhaus

BÓKAÚTGÁVA
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Bókin er ein sera viðkomandi bók um at hava Alzheimer. Hon er um gentuna Paulu, ið eigur eina ommu, sum hevur Alzheimersjúkuna. Omman er ikki sum ommur flest, hon gloymir, hvussu alt er, og sigur og ger mangt løgið. Men hóast so er, verður hon lýst við virðing og kærleika, tí Paula og familja hennara eru góð við ommuna. Sogan er søgd úr sjónarhorninum hjá gentuni, hon er ein kensluborin søga um Alzheimersjúkuna og tær broytingar, hon hevur við sær.

Bókin er væl eygnað til tey 5 – 8 ára gomlu og annars øll tey, ið hava áhuga fyri at skapa størri fatan fyri hesi sjúkuni, ið rakar nógv og sum er vanligasta minnissjúkan.

Lydia Didriksen týddi úr týskum. Alzheimerfelagið í Føroyum hevur stuðlað útgávuni. Í sambandi við útgávuna askipar Alzheimerfelagið fyri tiltaki í Miðlahúsinum í Havn fyri børnum og vaksnum.

Bókin Heystið hjá ommu er 26 blaðsíður, innbundin og kostar 140 kr í bókabúðunum, siga tey á Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	6
Qaqortoq	13
Ammassalik	8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	13
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	12
Lerwick	12
Aberdeen	16
London	19
Tromsø	--
Bergen	16
Oslo	--
Stokkhólm	18
Keypmannah.	18
Helsinki	16
Moskva	18
Berlin	18
Warzawa	21
Kiev	15
Bukarest	23
Paris	20
Madrid	28
Róm	23
Malorca	26
Athen	27
Malta	26
Tunis	28
Beijing	27
New Dehli	35
Bangkok	29
Jakarta	31
Sydney	29
New York	24
Miami	29
Los Angeles	22
Meksikobýur	18
Panama	30
La Paz	17
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	23

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 973 hPa. sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 990 hPa. vestan fyri Portugal – ex ódnin "GORDON" – fer norðureftir og dýpist..



Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer spakuliga í útsynning og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19/9 kl. 06^{00}– 20/9. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í september: - 0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/9 kl. 06^{00}– 20/9 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

22. september Tendring / Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/ Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/ Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
21. Sept	06.45	19.05	05.45	18.05	06.00	18.20	08.45	21.05	09.45	22.05	05.00	17.20	04.00	16.20	07.00	19.20	08.00	20.20	06.30	18.50	07.45	20.05
22. Sept	07.24	19.44	06.24	18.44	06.39	18.59	09.24	21.44	10.24	22.44	05.39	17.59	04.39	16.59	07.39	19.59	08.39	20.59	07.09	19.29	08.24	20.44
23. Sept	08.01	20.19	07.01	19.19	07.16	19.34	10.01	22.19	11.01	23.19	06.16	18.34	05.16	17.34	08.16	20.34	09.16	21.34	07.46	20.04	09.01	21.19
24. Sept	08.37	20.55	07.37	19.55	07.52	20.10	10.37	22.55	11.37	23.55	06.52	19.10	05.52	18.10	08.52	21.10	09.52	22.10	08.22	20.40	09.37	21.55
25. Sept	09.13	21.31	08.13	20.31	08.28	20.46	11.13	23.31	-	12.13	07.28	19.46	06.28	18.46	09.28	21.46	10.28	22.46	08.58	21.16	10.13	22.31

Sosialurin
5 707265 100050 >